## Clapson ger um seg í Íslandi

Paul Clapson hevur av álvara fingið ferð á málskjótingina í Íslandi. Í kappingini um Leinkjubikari í gjár vann felag hansara, Afturelding, stórsigur á 9-2 á Sindri, og heilar fimm ferðir var fyrrverandi KÍ-framherjin á blettinum. Higartil hevur onglendingurin skotið seks mál í trimum skrásettum dystum fyri Afturelding.



## Conteh skoraði

Fyrrverandi KÍ-álopsspælarin Denni Conteh var annar málskjúttin, tá ið danska 2. Deildarliðið Slagelse í gjár vann ímóti B93. Slagelse spældi á heimavølli, og longu eftir seks minuttir var Denni Conteh upp á spæl og skoraði fyri Slagelse. Í seinna hálvleiki økti Rasmus Festersen til 2-0, og tað gjørdist úrslitið av dystinum.

# 17 dystir uttan tap



### Teir 17 dystirnir

**Síðani Chelsea tann 16. desember í fjør tapti 1-0 móti Arsenal, hevur liðið ikki tapt í Premier League. Úrslitini síðani tá hava verið hesi**

| | | |
|---|---|---|
| 23.12 | Blackburn-Chelsea | 0-1 |
| 26.12 | Chelsea-Aston Villa | 4-4 |
| 29.12 | Chelsea-Newcastle | 2-1 |
| 01.01 | Fulham-Chelsea | 1-2 |
| 08.01 | Chelsea-Everton | 2-1 |
| 12.01 | Chelsea-Tottenham | 2-0 |
| 19.01 | Birmingham-Chelsea | 0-1 |
| 30.01 | Chelsea-Reading | 1-0 |
| 02.02 | Portsmouth-Chelsea | 1-1 |
| 10.02 | Chelsea-Liverpool | 0-0 |
| 01.03 | West Ham-Chelsea | 0-4 |
| 12.03 | Chelsea-Derby | 6-1 |
| 15.03 | Sunderland-Chelsea | 0-1 |
| 19.03 | Tottenham-Chelsea | 4-4 |
| 23.03 | Chelsea-Arsenal | 2-1 |
| 30.03 | Chelsea-Middlesbrough | 1-0 |
| 05.04 | Manchester City-Chelsea | 0-2 |

### Úrslitini um vikuskiftið

| | |
|---|---|
| Arsenal-Liverpool | 1-1 |
| Aston Villa-Bolton | 4-0 |
| Blackburn-Tottenham | 1-1 |
| Fulham-Sunderland | 1-3 |
| Newcastle-Reading | 3-0 |
| Wigan-Birmingham | 2-0 |
| Manchester City-Chelsea | 0-2 |
| Middlesbrough-Manchester United | 2-2 |
| Everton-Derby | 1-0 |

*Salomon Kalou hevur her takið á Nedum Onuoha frá Manchester City. Kalou skoraði seinna málið í 2-0 sigrinum, sum enn eina ferð økti trýstið hjá Chelsea á oddaliðið, Manchester United*

*Mynd: Polfoto/AP*

**Setið ein stóran kross í kalendaran tann 26. apríl. Tá hittast Chelsea og Manchester United á Stamford Bridge í tí, sum alt meira líkist eini avgerð um enska meistaraheitið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Chelsea hóttir nú av álvara Manchester United í ensku Premier League. Bláa London-liðið hevur ikki tapt síðani 16. desember í fjør, og so líðandi hava teir etið seg alt nærri Manchester United, sum annars hevur verið á beinari meistarakós.

Tann kósin varð tó avrættað nakað, tá Alfonso Alves við tveimum málum syrgdi fyri, at meistararnir bert fingu eitt stig við sær av Riverside í Middlesbrough. Cristiano Ronaldo hevði annars við sínum 37. máli hetta kappingarárið lagt Manchester United á odda, og so skuldi sigurin annars verið heima. Tí reyðu devlarnir høvdu í seks liga-dystum ikki latið mál fara ígjøgnum. Men Alves vildi tað altso øðrvísi, og var tað ikki fyri útjavnandi málið frá Rooney, vóru øll stigini eftir hjá Middlesbrough.

### Dupult gull í eygsjón

Dagin fyri hevði Chelsea enn einaferð prógvað, at teir veruliga eru við at finna meistarastevið aftur. Eftir eitt kappingarár, har órógvin hevur verið hampuliga stór eftir eitt venjaraskiftið. Og har Avraham Grant ongan tíð veruliga hevur fingið frið at útinna sítt arbeiði, er Chelsea nú veruliga farið at tevja blóð.

Eitt keðiligt tap móti Barnsley í FA-Cup'inum og eitt eins keðiligt tap móti Fenerbache í Champions League tykjast ikki hava ávirkan á stevið í heimligu kappingini. Hesa ferð fekk liðið tó hjálp frá Richard Dunne hjá Manchester City, sum sendi bóltin í egið mál tíðliga í dystinum. Og so kundi Salomon Kalou staðfesta sigurin átta minuttir inn í seinna hálvelik.

Og sigurin fekk venjaran, Avraham Grant, at staðfesta, at hann veruliga trýr upp á møguleikan fyri gulli í bæði Onglandi og í Europa.

- Liðið hjá okkum hevur funnið seg sjálvt nú. Spælararnir hava gjørt eitt framúr gott arbeiði, og eg havi stórt álit á teimum, segði Grant við enskar miðlar eftir dystin.

Um gullið í báðum kappingunum kann røkkast, veldst nú fyrst og fremst um tvinnar dystir. Longu í annaðkvøld skal Chelsea á heimavølli royna at venda 1-2 tapinum móti turkiska Fenerbache. Og tann 26. apríl er nú av álvara lagt upp til gullbrak, tá Manchester United kemur á vitjan á Stamford Bridge.

### Aftur javnt á Emirates

Aðra staðni í Premier League spældu Arsenal og Liverpool næsta 1-1 javnleikin upp í slag. Og longu týskvøldið skulu somu lið aftur í eldin, tá seinna fjórðingsfinalan í Champions League er á skránni.

Úrslitið bar eisini við sær, at Everton aftur kundi toga seg nærri Liverpool í dystinum um fjórða Champions League plássið og mongu milliónirnar, sum fylgja við hesum.

Og tá Bolton. Fulham og Derby øll taptu, líkjast tey trý alt meira vissum niðurflytarum. Ein leiklutur, sum Derby helst longu hevur vant seg við eftir eitt kappingarár, har teir higar til bert hava vunnið ein av 35 dystum.